Sáttmálin millum:

Føroya Arbeiðsgevarafelag
og
Føroya Arbeiðarafelag,
Havnar Arbeiðskvinnufelag,
Havnar Arbeiðsmannafelag,
Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag.
1. mai 2010 – 1. mai 2012

Til sáttmálan millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Arbeiðarafeløgini, dagfestur 15. mai 2007, og sum varð sagdur upp til 1. mai 2010, verða gjørdar niðanfyri standandi broytingar:

1. Grundløn og viðbót

Grundlønin hækkar soleiðis:

1. mai 2010	1,10 kr.
1. mai 2011	2,15 kr.

2. Eftirlønartrygging

Eftirlønargjøldini hækka soleiðis:

1. mai 2010: 0.3 % av arbeiðslønini
1. mai 2011 : 0,5 % av arbeiðslønini.

3. § 20 (FA og HA), §19 (HAK og KAK/KAM) Uppsagnir verður orðað soleiðis:

§ 20

Í einum og hvørjum arbeiði, sum varar longur enn 3 mánaðir, verður fyri tímalønt arbeiði uppsagnarfreistin frá arbeiðsgevara hendan:

Minni enn 6 mánaðar starvstíð:	5 arbeiðsdagar.
Meira enn 6 mánaðar starvstíð:	7 arbeiðsdagar.
Meira enn 1 ára starvstíð:	10 arbeiðsdagar.
Meira enn 2 ára starvstíð:	15 arbeiðsdagar.
Meira enn 3 ára starvstíð:	20 arbeiðsdagar.

Uppsagnarfreistin frá arbeiðara síðu verður aftaná 3 mánaðir: 5 arbeiðsdagar

Hetta er tó ikki galdandi, tá steðgur kemur í arbeiði vegna rávørutrot ella veður.

Uppsøgnin skal vera skrivlig fyri báðar partar.

Arbeiðsgevari skal skrivliga grundgeva fyri uppsøgnini, um tann uppsagdi biður um tað. Grundgevingin kann bert verða kravd, um tann uppsagdi hevur verið starvssettur í minst 3 ár.

4. Lønirnar í sersáttmálunum broytast samsvarandi frammanfyristandandi.

5. Allar greinatilvísingar í sáttmálunum verða rættaðar.

6. Í sáttmálunum FAG við FA, HAM, HAK og KAK/KAM verður §6 broytt soleiðis:

Verandi orðing verður strikað, og ístaðin verður sett: *"Setanarprógv verða givin sambært løgtingslóg um setanarprógv."*

7. Sama broyting verður gjørd í lønarsáttmálanum fyri fastlønt FAG við FA og HAK §4.

8. Í sáttmálunum FAG við FA, HAM, HAK og KAK/KAM verður §8 um prístal strikað.

9. Í sáttmálunum FAG við FA, HAM, HAK og KAK/KAM verður §9 broytt soleiðis, at jólaaftan verður broyttur frá at vera hálvur frídagur til at vera fullur frídagur.

10. Í sáttmálunum FAG við FA, HAM, HAK og KAK/KAM verður henda orðing sett inn aftast í §9, 2. og aftast í §9, 3.:

"Upplýsast skal 24 tímar frammanundan vaktarskifti byrjar. Um ikki fráboðað verður innan ásettu freistina, so skal gjaldast 1. yvirtíð tann dagin fyri hvørt arbeiðsfólk á vaktunum."

11. Í sáttmálunum FAG við FA, HAM, HAK og KAK/KAM verður §13 broytt soleiðis:

12. Aftaná *"14. hvønn dag"* verður sett *"/mánaðarliga."*

13. Í sáttmálarnar FAG við FA og HAM verður sett inn henda orðing sum nýggj § 27 (fylgjandi greinar broyta nummar samsvarandi) og í sáttmálarnar FAG við HAK og KAM/KAK verður sett henda orðing sum nýggj §26 (fylgjandi greinar broyta nummar samsvarandi):

"Formaðurin/-kvinnan í >navn á fakfelag< hevur rætt til farloyvi í í mesta lagi 6 ár uttan løn, og arbeiðsgevarin skal hava starv tøkt, tá ið farloyvistiðin er av."

14. Í sáttmálunum FAG við FA verður § 29 og í sáttmálunum FAG við HAK og KAM/KAK verður § 28 broytt soleiðis:
"Bygdina" ávikavist *"bygd"* verður broytt til *"bygdina/býin"* og *"bygd/bý"*.

15. Í sáttmálunum FAG við FA og HAM § 24 og í sáttmálunum FAG við HAK og KAM/KAK § 23 verður sett henda orðing:
"Til tess at fáa starvstíð frá nýggjum arbeiðsgevara skal arbeiðsfólkið kunna um møguliga starvstíð frá øðrum arbeiðsgevara við setan og í seinasta lagi, tá setanarprógvið verður undirskrivað."

16. Samstundis verður fylgjandi orðing sett inn í sáttmálan FAG við FA og HAM § 20, stk. 1 og sáttmálan FAG við HAK og KAM/KAK §19, stk. 1:
"Arbeiðsgevari hevur, tá setanin hjá arbeiðsfólkinum endar, skyldu at geva arbeiðsfólkinum prógv um starvstíðina hjá arbeiðsfólkinum."

17. Partarnir eru samdir um at broyta viðbøturnar í sáttmálunum til % soleiðis:
Viðbótin í §2 verður 0,06%
Viðbótin í §3 verður 0,29%
Viðbøturnar í §4 verða ávikavist 3,35%, 5,19%, 4,73% og 5,47%
Viðbøturnar í §5 verða ávikavist 1,17%, 1,62%, 3,59% og 4,02%
Viðbøturnar í §10 verða ávikavist 4,58%, 6,41%, 7,32% og 9,15%
Viðbótin í §15 verður 2,06%
Viðbøturnar í §18 verða ávikavist 13,73% og 27,45%
Viðbótin í §27 verður 9,15%.

18. Partarnir eru samdir um sáttmála fyri fastlønt á fiskavirkjunum. Hesin verður undirskrivaður, tá semja um nýggjar høvuðssáttmálar verður undirskrivað.

19. Víst verður til serstaka semju millum FAG og FA um broytingar í landarasáttmálanum, sum verður undirskrivaður, tá semja um nýggjar høvuðssáttmálar verður undirskrivað.

20. Víst verður til serstaka semju millum FAG og HA um broytingar sáttmálanum fyri fastløntar, sum verður undirskrivaður, tá semja um nýggjar høvuðssáttmálar verður undirskrivað.

21. Víst verður til serstaka semju millum FAG og FA og HAK um broytingar í sersáttmálanum fyri arbeiði á hotellum, gistingarhúsum, matstovum v.m., sum verður undirskrivaður, tá semja um nýggjar høvuðssáttmálar verður undirskrivað.

22. Gildi sáttmálans:

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. mai 2010, og kann sigast upp av pørtunum við 4 mánaða ávaring til ein 1. mai, fyrstu ferð 1. mai 2012.

Tórshavn 8. mai 2010

Vegna	***Vegna***
Føroya Arbeiðarafelag	***Føroya Arbeiðsgevarafelag***
.....	.....
Ingeborg Vinther	*Jóhan Páll Joensen*
.....	.....
Georg F. Hansen	*Kristoffur Laksá*
.....	.....
Elin Sørensen	*Jón Danielsen*
.....	.....
Sunrid Vang	*Jóhanna á Bergi*
.....	.....
Karla Einarsson	*Bergur Poulsen*
.....	.....
Agnar Olsen	*Meinhard Jacobsen*
.....	.....
Jógvan Páll Johansen	*Magni Arge*

Vegna
Havnar Arbeiðsmannafelag

.....
Hans Joensen

.....
Sakaris Hansen

.....
Jóhan Carl Dam

.....
Kári Olsen

.....
Martin Vennerstrøm

Vegna
Havnar Arbeiðskvinnufelag

.....
Vígdis Johannesen

.....
Anne Lisa Davidsen

.....
Ada Bisp

.....
Mariann Højgaard

.....
Marjun í Gong

Vegna
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag

.....
Arthur Guðjónsson

.....
Jóhan Andreas Reyðberg

.....
Aneseus Petersen

.....
Jákup Gerðalið

.....
Knút Guðjónsson

Vegna
Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag

.....
Jastrid Niclasen

.....
Hergerð Joensen

.....
Anna Højgaard

.....
Jóngerð Osberg

.....
Vónbjørt Guðjónsson